## Vegleiðing til venjingar og dystir fyri børn og ung – dagførd 10.09.20

**Leiðreglur í sambandi við venjing hjá børnum og ungum:**

- Um man er sjúkur, er man heima og møtir ikki til venjing. Um man ivast, er man eisini heima.
- Sjúkutekin: Hosti, febur, høvuðpínu, mistan luktisans, mistan smakkisans, møði, vødda og/ella liðpínu/pínu í kroppinum.
- Er felagsfundur ella máltíð áðrenn/aftaná venjing, eiga persónar at sita saman við í minsta lagi 1 metrar frástøðu millum hvønn leikara.
- Leikari hevur sín egna drekkidunk við til venjing.
- Bólturin kann verða ein smittukelda, og skal vaskast áðrenn og aftaná venjing.
- Vestar og venjingarútgerð skal í mestan mun handfarast av sama persóni, og útgerðin skal vaskast áðrenn og eftir venjing.
- Allir leikarar og venjarar/hjálparfólk skulu vaska/spritta hendur áðrenn og aftaná venjing.
- Felagið skrásetur allar persónar, sum eru til staðar til hvørja venjing (navn og telefonnummar).

**Leiðreglur í sambandi við dystir hjá børnum og ungum:**

- Um man er sjúkur er man heima og møtir ikki til dyst. Um man ivast, er man eisini heima.
- Sjúkutekin: Hosti, febur, høvuðpínu, mistan luktisans, mistan smakkisans, møði, vødda og/ella liðpínu/pínu í kroppinum.
- Um skiftingarrúm verður nýtt til fleiri ymisk lið sama dag, skal rúmið vaskast/sprittast í millum dystirnar.
- Er felagsfundur áðrenn dyst, eiga persónar at sita saman við í minsta lagi 1 metrar frástøðu millum hvønn leikara.
- Leikari hevur sín egna drekkidunk við til dyst.
- Bólturin kann verða ein smittukelda, og skal vaskast áðrenn og aftaná dyst
- Vestar og venjingarútgerð skal í mestan mun handfarast av sama persóni, og útgerðin skal vaskast áðrenn og eftir dyst.
- Leikarar heilsast ikki við lógvataki áðrenn og aftaná dyst.
- Allir leikarar, venjarar/hjálparfólk og dómarar skulu vaska/spritta hendur áðrenn og aftaná dyst
- Heimafelag hevur ábyrgd av at nóg mikið av spritti er í skiftingarrúmunum
- Heimafelag hevur ábyrgd av at skráseta allar persónar, sum eru til staðar til hvønn dyst (navn og telefonnummar).
- Foreldur / áskoðarar skulu í størst møguligan mun verða uttanfyri girðingina

**Víst verður annars til at fylgja almennu tilmælunum.**

**Fótbóltssamband Føroya**